

Føroyanevndin vitjaði á Thor í fjør.

# Danskir politikarar kunnast um føroyska oljuvinnu

Deil:

Jan Müller

07.08.2014 - 19:44

Oljan.fo

Um somu tíð sum borurin á West Hercules pallinum finnur sær veg niður í djúpu føroysku undirgrundina koma ikki færri enn 11 danskir fólkatingspolitikarar á vitjan í Føroyum. Harumframt eru bæði føroysku fólkatingsumboðini. Eitt av endamálunum við vitjanini er at fregnast um, hvussu gongst í føroysku oljuvinnuni og at fáa nýggjastu tíðindini um boringina á landgrunninum.

Vitjanin er frá sunnukvøldi til hósdag.

Umframt at vitja og tosa við føroyskar myndugleikar - landsstýrið, uttanlandsnevndina og Tórshavnar Kommunu - fara fara limirnir í Føroyanevnd Folkatingsins eisini at fáa innlit í føroyskt vinnulív.

M.a. verður rættiliga nógv tíð brúkt uppá alivinnuna, pelagisku vinnuna og ferðavinnuna, eins og tey fara at hitta fólk handan átakið "Vit velja Føroyar".

Oljuvinnan er á skrá mikudagin, tá tey fyrst hitta Ben Arabo, formann í Føroya Oljuídnaðarbólki, FOÍB, sum fer at geva eitt yvirskipað innlit. Síðani verður farið til Runavíkar, har tey hitta umboð fyri Atlantic Supply Base.

Formaðurin í nevndini er føroyski fólkatingsmaðurin, Sjúrður Skaale. Oljan.fo spurdi hann, hví júst oljan fyllur lutvíst nógv á hesi vitjanini.

“Tað er náttúrligt, nú øll eru spent um úrslitið av verandi boring, og ikki minst tí at oljuvinnan er vorðin ein alsamt vaksandi partur av føroykum vinnulívi. Eg havi - bæði í nevndini sjálvari, í Fólkatingssalinum og á ráðstevnum - mangan tosað um tann týdning oljuvinnan longu hevur fyri Føroyar, og hvønn týdning hon kann fáa, um olja ella gass verður funnið á okkara øki. Ikki bara fyri føroyska samfelagið, men eisini fyri bæði tey búskaparligu og politisku viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Á seinastu vitjan hitti nevndin eisini umboð fyri Jarðfeingi. Tí haldi eg, at áhugin er stórur fyri hesum parti av vitjanini.

Haldi tað eisini vera sera umráðandi, at danskir politikarar vita, hvat hetta snýr seg um, hvat tíðarperspektivið í tí er, og at hetta fult og heilt er føroysk ábyrgd og føroyskur rættur.”

Luttakararnir á ferðini eru:

Sjúrdur Skaale (JF), formaður

Edmund Joensen (SP), næstformaður

Flemming Møller Mortensen (S)

Torben Hansen (S)

Rasmus Prehn (S)

Karin Gaardsted (S)

Christian Juhl (EL)

Kim Andersen (V)

Claus Hjort Frederiksen (V)

Flemming Damgaard Larsen (V)

Thomas Danielsen (V)

Finn Thranum (V)

Marie Krarup (DF)